Fólkaheilsuráðið
The Faroese board of public health

(1)

Heilsu- og innlendismálaráðið
Eiragarður 2
FO-100 Tórshavn

Tórshavn, 21. januar 2019
Skjalanr. 130400-3-2019/2 MM/oj

**Svarskriv**

**Viðv. Uppskoti til løgtingslóg um rúsdrekka- og rúsevnaviðgerðarstovnum**

Í teldubrævi 15. januar 2019 biður Heilsu- og innlendismálaráðið um viðmerkingar til "Uppskot til løgtingslóg um rúsdrekka- og rúsevnaviðgerðarstovnum".

Fólkaheilsuráðið gleðist um, at Heilsu- og Innlendismálaráðið ynskir at fáa greiðari regluverk og professionalismu inn á rúsevnisviðgerðarstovnarnar. Fólkaheilsuráðið metir, at tað manglandi lógarverkið innan viðgerð av rúsdrekka- og rúsevnismisnýtslu er ein stórur trupulleiki í verandi løtu.

Til kap 2.
§2, stk. 2: Fólkaheilsuráðið metir ikki, at Heilsutrygd einsamalt hevur fakliga førleikan at meta um fakligu góðskuna á einum viðgerðarstovni. Her meta vit, at tilmælið um góðkenning og broytingar eigur at gerast av fakligum mynduleikastovni, sum arbeiðir granskingargrundað.

§2, stk. 3: Her eigur at skoytast uppí, at meting av dygdini eigur at vera framd av fakligum mynduleikastovni, sum arbeiðir granskingargrundað. (í mun til punkt 1 og 3).

§2, stk. 4: Aftur her eigur fakligur mynduleikastovnur at meta um hesi viðurskifti.

Til kap 3.
§4, stk. 1: Ein sálarfrøðilig greining av persóninum eigur eisini at vera gjørd, áðrenn innskriving á viðgerðarstovn fer fram. Hetta eigur sálarfrøðingur at gera.
§4, stk. 2: Fólkaheilsuráðið heldur, at tann sosialfakliga metingin eigur at vera gjørd av skikkaðum fakpersóni.

Vit vóna, at okkara tilmæli verður tikið til eftirtektar.

Vegna Fólkaheilsuráðið

Magni Mohr, formaður

J.C. Svabosgøta 43 • FO-100 Tórshavn • Tlf.: +298 30 47 00
Heimasíða: www.folkaheilsa.fo •T-postur: fhr@folkaheilsa.fo